SUÐUROYAR SPARIKASSI

Vágsvegur 60
FO-900 Vágur
Fax +298 359871

Staravegur 9
FO-100 Tórshavn
Fax +298 359873

Tel +298 359870

P/F nr. 4122
V-tal 550558
Skr. nr. 9870

www.ss.fo

# 2.10 Lønarpolitikkur

## *2.10.1* 1. Innleiðsla

Grundað á lóg um fíggjarlig virksemi § 71, §§ 77a-d umframt § 4 í Kunngerð nr. 901 frá 13. juli 2015 fyri Føroyar um lønarpolitikk og upplýsingarskyldur um lønir í fíggjarvirkjum, hevur nevndin samtykt hendan lønarpolitikkin.

Politikkurin ásetur politikkin og leiðreglur fyri lønarútgjald hjá Suðuroyar Sparikassa, íroknað eftirlønarpolitikk og leiðreglur fyri fráfaringarsamsýningar.

Lønarpolitikkurin verður kunnaður eftir, at nevndin hevur samtykt hetta fyri aðalfundin.

### 2. Lønarpolitikkur

Politikkurin viðvíkjandi løn og eftirløn umframt leiðreglur fyri eftirlønarpolitikk og fráfaringarsamsýning fyri nevnd, stjórn og starvsfólk, hvørs virksemi hevur stóra ávirkan á váðaprofilin Suðuroyar Sparikassa (týðandi váðatakarar), umframt starvsfólk í eftirlitisleiklutum í Suðuroyar Sparikassa.

Lønarpolitikkurin hevur sum endamál at reka ein lønarpolitikk- og venju, ið samsvarar við og er til frama fyri sunna váðastýring í Suðuroyar Sparikassa.

**Nevnd og stjórn**

Nevnd og stjórin fáa ikki goldnar variablar lønarpatar, hvørki sum løn, partabrøv, ábyrgdarfæ, eftirløn ella onnur samsvarandi skipan. Tó kunnu uppgávur ísv. serlig høvi tillutast metta upphædd gjøgnum árið.

**Týðandi váðatakarar**

Variablir lønarpartar verða ikki goldnir starvsfólkum, hvørs virksemi hevur týðandi ávirkan á váðaprofilin (týðandi váðatakarar) hjá Suðuroyar Sparikassa, hvørki sum løn, partabrøv, ábyrgdarfæ, eftirløn ella onnur samsvarandi skipan. Tó kunnu uppgávur ísv. serlig høvi tillutast metta upphædd gjøgnum árið.

**Starvsfólk í eftirlitisstørvum o.s.fr.**

Variablir lønarpartar verða ikki goldnir starvsfólkum í eftirlitisstørvum, hvørs virksemi hevur týðandi ávirkan á váðaprofilin (týðandi váðatakarar) hjá Suðuroyar Sparikassa, hvørki sum løn, partabrøv, ábyrgdarfæ, eftirløn ella onnur samsvarandi skipan. Tó kunnu uppgávur ísv. serlig høvi tillutast metta upphædd gjøgnum árið.

## 3. Lønarnevnd

Í lønarnevndini eru allir nevndarlimirnir í nevnd Sparikassans.

## 4. Árlig endurskoðan av lønarpolitikkinum

Nevndin skal árliga endurskoða lønarpolitikkin við tí fyri eyga at laga hann til menning Sparikassans.

**Góðkent á nevndarfundi 6. februar 2024**

Helga á Borg

*Nevndarforkvinna*

Hans Petur Joensen

*Næstformaður*

Rúni Joensen

*Nevndarlimur*

Anna Borg Dahl

*Nevndarlimur*

Jákup Flóvin Sigmundarson Olsen

Nevndarlimur

Niels Johannesen

Nevndarlimur